# Frá Føroya Psoriasisfelag

6. apríl verður aftur farið til Íslands til viðgerð fyri psoriasis.

Tey, ið hava tørv á viðgerð og kundu hugsa sær at komi við, skulu fara til egnan kommunulækna. Læknin fyllir út umsóknarblað og sendir tað til Landssjúkrahúsið.

Umsóknin skal vera Landssjúkrahúsinum í hendi seinast 11. mars.

Eru ivaspurningar ber til at ringja á tlf. 424179

Vinarliga

**Føroya Psoriasisfelag**

---

## Eysturoyar Javnaðarfelag

# Aðalfundur

Aðalfundur felagsins verður á Muntra í Fuglafirði

***mánadagin 4. mars kl. 20⁰⁰.***

Skrá sambært lógum felagsins.

Umboð fyri flokkin verða við.

**Nevndin**

---

# Diabetesfelag Føroya

Aðalfundur felagsins verður leygardagin 16. mars 2002 á Hotel Hafnia.

Skrá sambært lógum felagsins.

Á fundinum fer Heri Joensen, prestur, at tala um hugtakið »lívskvalitet«.

**Nevndin**

---

Um hóskandi boð fæst, verður

# Partafelagið ZENITA

lýst til sølu.

Partafelagið rekur tveir ídnaðartrolarar, M/S BERIT S – TG 640 og M/S Zenita – TG 540.

Eisini eigur, og luttekur felagið í øðrum vinnufyritøkum.

Áhugaði kunnu venda sær til:

**Atlantic Brokers**
tlf: 312238 • fax: 310907
e-mail: sc@atlantic-brokers.com

---

**Landssjúkrahúsið**
Fo 100 Tórshavn

# Summarferiuavloysarar 2002

**Sjúkrasystrar**
**Radiografar**
**Pleygarar**
**Almanna- og heilsuatstøðingar**

Søkt verður eftir røktarstarvsfólki til fulltíðar avloysarastørv í skiftandi vaktum á Landssjúkrahúsinum í summarferiutíðarskeiðinum 1. juni til 31. august 2002.

Deildirnar, sum tørva summarferiuavloysarar í ár, eru:

- hæmodialysa
- intensiv/cardiologi
- barnadeild
- føðideild og præmatur
- geriatri/rehabiliteringsdeild
- skurðdeild og skaðastova
- kirurgiskar seingjadeildir
- psykiatriskar deildir
- røntgen (við tilkalluvakt frá bústaði)
- ábyrgdarhavandi sjúkrasystir í dagvaktum í vikuskiftum, kvøld- og náttarvaktum (trissufunktiónin)

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til:

- Marin Vang, sjúkrarøktarstjóra, tlf. 31 35 40, lokal 266, e-post: marinv@ahs.fo
- Cecilia Vestureið, yvirsjúkrasystir á Skurðdeildini, lokal 499, e-post: ceci@ahs.fo
- Ása Poulsen, yvirsjúkrasystir á Heiliráðdeildini,lokal 300, e-post: asap@ahs.fo,
- Bergit Weihe, yvirsjúkrasystir á Psyk.deildini, lokal 351, e-post: bergitw@ahs.fo
- Ragna S. Reinert, deildarsjúkrasystir á Røntgendeildini, lokal 149, e-post: rtragna@ahs.fo.

Løn- og setanartreytir samb. sáttmála millum avvarandi yrkisfelag og Fíggjarmálastýrið.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum v.m. skal sendast til

**Landssjúkrahúsið**
Starvsfólkadeildin
100 Tórshavn

Umsóknarfreistin er 15. mars 2002 kl. 12.00.

---

## Frá Føroya Lærarafelag Ársaðalfundur

Ársaðalfundur felagsins verður leygardagin 20. apríl 2002 kl. 10.00 í hølini á Føroya Læraraskúla

Skrá sambært viðtøkum felagsins
Veitsla verður um kvøldið

FØROYA LÆRARAFELAG

---

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Arkitektur

Tórshavnar kommuna søkir við hesum eftir arkitekti til byggi- og býarskipanardeildina at byrja skjótast til ber.

Byggi- og býarskipanardeildin er deild undir teknisku fyrisitingini og hevur m.a. planlegging, byggimál, lendisviðurskifti og kommunalar ognir um hendi.

**Arbeiðsuppgávur**
Viðkomandi verður leiðari á planleggingardeildini, har uppgávurnar í høvuðsheitinum eru:

- útstykkingarætlanir
- byggisamtyktir og lokalplanir
- býarplanlegging
- landslagsplanlegging
- sektorplanlegging
- projerktering og eftirlit
- bygging av kommunalu bygningum

**Førleikakrøv**
Umsøkjarin skal verða útbúgvin arkitektur, umframt at:

- hava royndir innan planlegging, projektering og eftirlit, umframt umsiting.
- hava góðan kunnleika til EDV (Microsoft Windows, Word, Excel og Outlook, umframt Cad tekniprogram og/ella MicroStation).
- duga væl føroyskt, bæði í skrivt og talu.
- hava koyrikort.

**Eginleikar**
Tað er umráðandi at umsøkjarin kann arbeiða sjálvstøðugt, dugir væl at leggja arbeiðið til rættis, er fyrikomandi og dugir væl at arbeiða saman við starvsfólkunum á deildini.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmálanum millum Arkitektafelagið og Fíggjarmálastýrið, løn og viðbót samb. sáttmálanum.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Marius Müller, tekniska stjóra, ella Janus Isfeldt, lønarfulltrúa á 315160.

**Umsóknir**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skulu vera Tórshavnar kommunu, Postboks 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi mánadagin 18. mars 2002.
Viðmerk á brævbjálvan "arkitektur".

SNARSKIVAN

---

# Skeið til krana D

**(8 - 25 tm)**



**byrjar mánakvøldið 4. mars. kl. 19.00**

Avmarkað næmingatal!

team85

SP/F *Koyrikortið*
Tórshavnar Trafikkskúli
Stoffalág 82 • Tel 318821 • 315298 • Fartel 218777 • hajah@post.olivant.fo

---

KPMG

# Fíggjarleiðari

Størri fyritøka søkir eftir leiðara til fíggjardeildina at byrja skjótast gjørligt.

**Uppgávurnar**
á deildini fevna um fíggjarætlan, bókhald, roknskapir, lønarumsiting og innkeyp.

**Starvið**
fevnir um búskaparliga planlegging, stýring og eftirlit.

Arbeitt verður við at umleggja búskaparskipanina hjá fyritøkuni, herundir edvskipan, mannagongdir og búskaparrapportering.

Talan er um eitt avbjóðandi starv við góðum møguleikum fyri fakligari og persónligari menning.

**Umsøkjarin**
skal hava hægri útbúgving og royndir innan fíggjarstýring.

**Umsóknin**
skal verða okkum í hendi í seinasta lagi 4. mars 2002.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til John Petersen, cand.merc.aud. á tel 34 34 34 ella við telduposti til: jpetersen@kpmg.fo

team85

KPMG statsaut. revisorar Sp/f
Postsmoga 3258, FO-110 Tórshavn
Tel 34 34 34 Fax 34 34 35

---

# Sethús í Sørvági til sølu

Húsini standa á Stórheyggi og eru í 2 hæddum.

Samlað búøkið er 120 fermetrar, alt innrættað. Grundøkið er 703 fermetrar.

Í ovaru hæddini eru: 4 kømur, gongd og baðirúm v/ w.c.

Í niðaru hæddini er: stova, køkur, grovkøkur/fýrrúm, gongd og w.c.

Húsini eru úr betong og klødd við timbur og standa serliga væl fyri í friðarligum barnavinarligum umhvørvi, og við sera góðum útsýni yvir bygdina og Sørvágsfjørð.

Byggiár: 1989

Húsini verða seld um hóskandi boð fæst.

Áhuga kunnu ringja

**Tlf. 332834**
*eftir kl. 17.00*

---



# - Starvsfólk!!!

**Av tí at P/F SNODD víðkar um virksemi sítt, søkja vit eftir dugnaligum og røskum fólki, til alt vanligt fiska-arbeiði.**

**Áhugaði kunnu venda sær til:**

| | |
|---|---|
| **Skrivstovuna** | **44 99 94** |
| **Dánial** | **21 25 60** |
| **Jóhannus** | **21 70 60** |

**P/F SNODD**

Tel. +298 44 99 94 - Fax. +298 44 91 19 - e-mail. snodd@snodd.fo

---

# Fólk søkist

Søkt verður eftir fólki at arbeiða í handlinum í Vágsbotni.

Skal helst hava arbeitt í handli fyrr.

**PF. VALDEMAR LÜTZEN**
tlf. 311675

---

# Lærarastarv

Vegna barnsburðarfarloyvi verður søkt eftir lærara 25 tímar um vikuna.

Starvið er tíðaravmarkað frá 11. mars til 30. juni 2002.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til skúlastjóran tlf. 361038.

Starvið verður lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið.

Umsóknir við ljósriti av prógvi og møguligum viðmælum skulu vera skúlastýrinum í hendi seinast hósdagin 7. mars 2002.

**Skúlastýrið fyri Sandoyar Meginskúla**
v/Ingibjørn Eldevig
210 Sandur

---

# Maskinsmiðir og sveisarar

Vegna økt virksemi sóknast vit eftir bæði maskinsmiðum og sveisarum at byrja skjótast gjørligt.

Sveisarar, ið hava sertifikat og royndir við at sveisa aluminium hava fyrimun.

Løn eftir avtalu.

Nærri fæst at vita, við at venda sær til Sigurd Poulsen á tel 471000 ella 217470.

team85

HYDRO TECH

**Hydro Tech P/F • FO-470 Eiði**
**Tel 471 000 • Fax 471 001**
**info@hydro-tech.fo**
**www.hydro-tech.fo**

---

# FÓLK til Griffilin

**Søkt verður eftir fólki at arbeiða hálva tíð**

Vit sóknast eftir fyrikomandi, ágrýtnum fólki, sum dugir at arbeiða sjálvstøðugt.

Arbeiðstíðin er aðruhvørja viku fyrrapart, aðruhvørja viku seinnapart og annaðhvørt vikuskifti.

Tað er ein fyrimunur, um tú hevur royndir innan handil, men hetta er tó eingin treyt.

Tú kanst byrja beinanvegin.

Ljóðar hetta sum nakað fyri teg, so send okkum eina skrivliga umsókn ella ring og tosa við Róa Kalsø á tel 310840.

griffilin
SMS